## DAGSINS MEINING

# Løgmaður skjýtur við síðina av

Uppskotið um samsýning og eftirløn landstýrismanna fall við triðju viðgerð í tinginum herfyri. Ymiskt er, hvat fólk halda, men í tinginum eru flestu limir í hvussu so er glaðir fyri at tað fall. Tað má sigast at verða skeiv adressa, tá Løgmaður leggur eftir Sambandsflokkinum í málinum um samsýning og eftirløn Landstýrismanna.

Vit vita, at eitthvørt uppskot um eina hækking á hesum økinum er ótrúliga ópopulert millum fólk. At val er um fáar mánaðar ger ikki støðuna betur, og hevur hetta helst ávirkað atkvøðugreiðsluna á tingi, tá málið fall. Onkrir samgongulimir hava ivaleyst fingið kaldar føtur.

Løgmaður leggur eftir Sambandsflokkinum, tí hann saman við hinum stóra andstøðuflokkinum Javnaðarflokkinum atkvøddi ímóti uppskotinum. Eftir øllum at døma meinti løgmaður, at onkur avtala við Sambandsflokkin fyrilá. Tað skulu vit ikki taka dagar ímillum, men størsti trupulleikin hjá løgmanni tykist vera, at hann ikki hevur stýr á sínari egnu samgongu. 3 tinglimir hjá Tjóðveldisflokkinum atkvøddu ímóti uppskotinum saman við andstøðuflokkunum, og tí fall uppskotið. Nú kann hann sjálvandi siga, at hetta er eitt tvørflokspolitiskt mál, og at tað tí ikki eigur at verða hugt eftir, um nú talan er um samgongu- ella andstøðuflokkar. Tað kann væl vera, men kortini átti hann at megnað at "tvinga" sínar samgongumenn til at vera loyalar móti landsstýrinum.

Løgmaður nýtist nevniliga heldur ikki at leggja eftir andstøðuni, tá limir í hansara egnu samgongu atkvøddu ímóti. Um løgmaður helt, at hetta samgonguuppskot var av alstórum týdningi, so gjørdi hann tað til ein kabinettspurning. Hevði løgmaður gjørt hetta, so hevði støðan antin verið tann, at Tjóðveldismenn bakkaðu, ella høvdu vit samgonguslit og allarhelst nýval í dag.

Samsýning generelt er týdningarmikið, men slíkt má ikki rumblast ígjøgnum. Tað krevur gjølla umhugsan og ikki minst vilja og má frágreiðast væl yvirfyri borgarnum. Eitt hevur man so lært í undanfarna ári, og tað er, at tað ikki loysir seg, at atkvøða eftirlønir ígjøgnum í allari friðarligheit. At so eingin tinglimur av 30 til staðar atkvøddi ímóti tí uppskotinum við 3 viðgerð, er so ein onnur søk, sum vit hava sagt okkara meining um, og tí skulu vit lata tað liggja á hesum sinni.

Løgmaður er so ikki í einari sterkari støðu at leggja ábreiðslur á andstøðuna, tá hansara egnu samgongulimir fella eitt samgonguuppskot. Hetta átti at sagt okkum eitt sindur um stevið í samgonguni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ein stórur statsmaður vitjar Føroyar

**Hann kom, hann sá, hann sigraði**

**Edmund Joensen**



Allir flokkar á tingi kappast um rósa statsministaranum fyri hansara politisku loysnir á øllum økjum. Løgmaður var ovurfegin á tíðindafundinum, og hann brast í látur fyri opnum sjónvarpskýggja tá tíðindafólk spurdu um skiftistíðin fyri loysingini var viðgjørd.

Varaløgmaður lovprísaði øllum sum sagt var, og fekk tað burturút, at sjeymílastyvlarnir máttu takast í brúk, so hann sjálvur ikki varð yvirhálaður av loysingini.

Formaður Javnaðarflokksins var himmalfegin. Hann hevði sum so mangan áður fingið allan rættin. Sjálvstýrislógin hevði fingið bláa stemplið frá Anders Fogh, eins og frá undanmanni hansara.

Sambandsformaðurin, sum allan dagin hevði gingið við Nýskipanaruppskoti floksins undir arminum, skilti púrt onki. Hon helt seg ikki koma í tankar um nakað orð, av øllum tí sum statsministarin segði, sum ikki stendur svart uppá hvítt í Nýskipanaruppskoti Sambandsflokksins.

Um tað so vóru orð Statsministarans fyri trimum árum síðan á baksíðuni av Nýskipanaruppskotinum, so standa tey óbroytt í dag.

**Statsmaður á brúnni – og ein fiskiklógv.**

Eins og ein góður skipari, sum ætlar sær at gera ein góðan túr, lurtaðið statsministarin væl eftir veðurvánunum, pikkaði á barometrið, hugdi uppí luftina, visti av royndum alt um streymviðurskifti og valdi sær rætt sjóvarfall.

Leiðin farast skuldi henda túrin var ikki sørt vandamikil. Navigerast mátti neyvt ímillum politiskar bogar og sker. Túrurin kundi miseydnast. Skiparin undan honum var mangan komin aftur ongul í reyv, illa tuskaður.

Reiðaríðið heima var samt um at skiparatreytirnar vóru uppá ein prikk tær somu, sum hjá undanmanni hansara. Gud náði hann um tær treytirnar ikki vóru yvurhildnar. Helst avkoyrdur!

Línan var eisini tann sama hendan túrin sum hjá undanfarna skiparanum. Onkur fløkjustampur var eisini eftir frá seinasta túri.

Hvat var til ráðar at taka? Tað mátti egnast betur, við nýggjum agni, helst feskari goggu, tað finst onki betur.

Hann valdi eisini tað besta agnið, Nýskipanaruppskot sambandsflokksins, fór glaður avstað og kom á fiskileið við einum stórum smíli.

Tað var á hvørjum húki. Tann beri toskur, stórur toskur, teir flestu høvdu kíkað so tilbar at draga við fullari ferð.

**Gløgt er gestsins eyga**

Hvat siga útlendingar um Fiskiskapin, sum vardi minni enn eitt samdøgur?

Politikken frá 16. januar sigur tað soleiðis: " Fogh udretter allerede under det første møde med Kallsberg noget, der hurtigt udlægges som et mirakel. De enes om at fabrikere en fælleserklæring. Ni beskedne linjer med et yderst beskedent indhold. > Regeringen er indstillet på at samarbejde om landstyrets ønsker om overtagelse af yderligere sagsområder indenfor grundloven og rigsenhedens rammer < lyder den sentrale passage." Anfinn Kalsberg ligner selve solen, da hann træder ud ad døren.

Om aftenen spiser Anders Fogh Rasmusen middag sammen med det samlede Landstyre. Stemningen er i top da Fogh tager ordet og sammenfatter dagens bedrifter.

" Alle har sagt , at det, der står i den tekst, er lige nøjagtig deres politikk" siger han og får dem alle sammen til at grine, selv om det på en måde er dem selv, de griner af.

"Jeg er altså kommet som en fredens engel i det færøske samfund " fortsætter hann.

Næste morgen har Anfinn Kallsberg et sidste møde med Fogh. "Vi taler ikke længere forbi hinanden" konkluderer lagmanden, inden statsministeren letter fra Vágarlufthavnen. I vindstille og næsten klart vejr.

Vit onnur kunnu bert undrandi hyggja, lurta og spyrja. Er Anders Fogh Rasmusen veruliga so avbera stórur og genialur statsmaður, sum úrslitið ber boð um. Ella er manningin hinu megin borðið ov løtt ?

# Búskaparvøkstur, skiftistíð og fíggjarlógin fyri 2002

**Jóhan Petur Johannesen**



**Tað lekur millum teori og praksis hjá landsstýrinum. Ynskidreymarnir um búskaparvøkstur í Hvítubók líkjast meira og meira hvørvisjónum.**

Tá landsstýrið á sumri ár 2000 var til samráðingar í Keypmannahavn um ein sáttmála millum "fullveldið Føroyar og kongaríkið Danmark", setti landsstýrið ynski fram um 15 ára búskaparliga skiftistíð. Men heldur enn at kalla 15 ár fyri 15 ár, valdi landsstýrið at seta eitt roknistykki upp sum segði, at Føroyar skuldu hava eina árliga veiting úr Danmark á 650 mió. krónur. Hetta skuldi vera galdandi líka til føroyska bruttotjóðarúrtøk-

*Framhald á síðu 11*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 10*

an var vaksin til eina so stóra upphædd, at tær 650 milliónirnar svaraðu til 3 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni. Frá tí degi skuldi blokkstuðulin minkast burtur eftir trimum árum.

Danskir fjølmiðlar vóru skjótir at rokna út, at hetta merkti ikki 15- men 63 ára skiftistíð.

Í tíðindaskrivi frá Landsstýrinum um hetta (sum eisini varð sent donsku fjølmiðlunum) varð sagt, at hesi tíðindi vóru beinleiðis ósonn. Sagt varð millum annað: *"Landsstýrið vísir til, at vøksturin í føroyska búskapinum hevur seinastu seks árini verið 9,8 prosent í meðal. Um hesin vøkstur heldur fram, fellur blokkurin burtur eftir 11 – 12 árum"*.

**Fíggjarlógin fyri 2002**

Tann 29. desember 2001 hevði Sosialurin eina samrøðu við Karsten Hansen, landsstýrismann, um fíggjarlógina fyri 2002. Har stóð millum annað soleiðis: *"Seinnu árini hevur búskaparvøksturin verið eini fimm-seks prosent árliga. Men landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur ikki roknað við hesum, nú hann hevur gjørt fíggjarlóg fyri komandi ár.*

*Í komandi fíggjarlóg verður bert roknað við einum vøkstri upp á umleið eitt prosent, sigur Karsten Hansen, sum heldur vil vera varin enn at noyðast at koma aftur umaftur."*

Jú víst er tað gott at vera varin, men 1 prosent má sigast at vera sera lítið, tá ein sigur seg trúgva uppá 9,8 prosent.

Um vit nú venda aftur til skiftistíðina, so minnist eg, at onkur hevði roknað út, at ein búskaparvøkstur á 2 prosent eftir roknistykkinum hjá landsstýrinum, gav 60 ára skiftistíð, meðan 1,5 prosent góðu 79 ára skiftistíð. Hvussu nógv 1 prosent gevur, veit eg ikki, - men tað kann eisini vera líka mikið, tí tað hevði ikki verið í okkara tíð, at tann skiftistíðin bleiv liðug.

Δ

# Aftursvar til løgtingsmannin Páll á Reynatúgvu

**Ingeborg Vinther**



Løgtingsins trivnaðarnevnd.

Í grein í bløðunum 9. januar 2002, leggur Páll á Reynatúgvu meg undir at fara lætt um sannleika, rættleika og veruleika í tí føri, har eg havi úttalað meg í samrøðu við Útvarp Føroya nýggjársaftan, um førda socialpolitikk hjá samgonguni, har eg sigi, at samgongan nýtti alla orkuna til fullveldispolitikkin í staðin fyri til socialpolitikk.

Men eitt kann eg siga tær - Páll, eg havi altíð torað at sagt sannleikan, sjálvt um sannleikin ofta verður illa hoyrdur - eisini hesuferð. Tað er møguliga samvitskan hjá hesum nýggja politikkara, sum ofta sat á fundi sum fakfelagsumboð í sínari tí, sum kanska hevur gloymt tað tíðina nú, men eg og onnur hava ikki gloymt tað tíðina.

Eg havi ongar rangar fakpolitiskar niðurstøður gjørt, men bert sagt tað í veruleiki er.

Og eg skal nokk í seinni grein koma meira inn á tey avrik Páll á Reynatúgvu og sitandi samgonga hava gjørt, tá tað kemur til tey politisku avrik ið gjørd eru tey seinastu skjótt fýra árini á arbeiðsmarknaðinum. Eg havi í hvussu er, ikki merkt nakað serligt til at Páll hevur stríðst fyri rættindi hjá okkara verkafólkið, so at teirra livikor eru batnaði munandi seinastu fýra árini.

Eg skal gera nakrar viðmerkingar til tey mál Páll rósar samgonguni at hava framt.

**Dagpeningaskipanin**

Broytingarnar í dagpeningaskipanini er ein bati, tað er rætt, men at dagpeningalógin er eitt risaframbrot sum Páll sigur, er ikki rætt. Tá hann samstundis sigur, at nú kann verkafólk verða sjúk eins og øll onnur og fáa fulla løn er tað ósatt. Verkafólk fáa framvegis 80% av lønini í sjúkrapengi og tíðarskeiði er ikki 10 mánaðir men 9 mánaðir, hetta skuldi løgtingsmaðurin vita, hann er formaður í Løgtingsins trivnaðarnevnd.

At Páll kemur sær at nevna karensdagarnar, øll Føroya fólk vita hvussu fakfeløgini stríddust og eisini andstøðan bakkaði upp, fyri at fáa karensdagarnar burtur, men samgongan var ímóti, tað var í síðstu løtu at ynski um at fáa karensdagarnar burtur var gingið á møti.

Tá Páll so forhánisliga skrivar, at semjan samgongan kom við var nógv betur, enn tað uppskoti undirritaða og arbeiðsgevarafelagið skeyt upp fyri Løgtingi. Kann eg upplýsa Páll um - at eg sum umboð fyri løntakaran og eitt umboð fyri arbeiðsgevarafelagið saman við umboðum frá Heilsumálastýrinum og Almannastovuni - at uppskotið fór ikki í Løgtingið, men fyri táverandi landsstýriskvinnu í heilsumálum Helenu Dam á Neystabø, tá Heilsumálastýrið hevði gjørt sínar viðmerkingar til lógaruppskoti legði tað fyri Løgtingið, hetta skuldi tú vita Páll, sum tingmaður og formaður í trivnaðarnevndini.

**Barsilsskipanin**

Jú Páll, undirritaða hevur sannliga lagt merki til barsilsskipanina, ið varð samtykt yvir høvdi á fakfeløgunum. Eg skal í seinni grein gera viðmekingar til hesa skipan.

Tað sær út til at tú hevur fingið fortreð av, at tey tímaløntu hava fingið betri sømdir undir barnsburði. Tá tú kanst geva ilt av tær, tí Vinnumálastýri ikki slapp at gera skipanina verri fyri tey tímaløntu, tá tú kanst finna uppá at skriva at tey fingu lønarhækking ella meiri enn um tey vóru til arbeiðis, - álvaratos Páll á Reynatúgvu! hvar er títt sociala medvit ?

Ja Páll, undirritaða lovaði sum tú sipar til, bál og brand saman við andstøðu á Løgtingið og øðrum góðum kreftum, um samgongan broytti barsilsskipanina til tað verra fyri tey tímaløntu, tað skuldi tú eisini gjørt um tú ert so góður við verkafólkið sum tú skrivar.

**Arbeiðsumhvørvislógin**

Tað kundi verði áhugavert at fingið at vita, hvussu nógv Páll og restin av samgonguni hevur gjørt fyri at fylgja hesu nýggju Lóg um arbeiðsumhvørvi upp. Henda Lóg ið varð sýlta í Landsstýrinum í nógv ár - eisini meðan tín flokkur var í samgongu - og enn ikki komin at virka.

Hvussu nógv hevur samgongan játtað meira til Arbeiðseftirlitið á fíggjarlógini fyri hetta árið, so Arbeiðsumhvørvislógin kann fáast at virka og eisini so arbeiðseftirlitið kann virka sum tað eigur ? eg spyrji bara, tí lítið nyttar at rósa sær av nýggjum lógum, um peningur ikki er játtaður so lógin kann virka eftir ætlan.

**Pensiónslógin**

Eg kann fyrst siga tær, at øll tey ið stríðast fyri betri korum til tey veiku og til verkafólkið, vita væl at tað er ein almenn uppgáva at syrgja fyri at allir borgarar eru tryggjaðir eina pensión sum tey hava møguleika at liva eitt sømuligt lív við. Heldur tú at verkafólk hevur nógvan pening at seta til síðis til tey koma til eftirlønaraldur? nei Páll, fólkatryggingin hjá fólkaflokkinum er ongin loysn um tú heldur tað.

Og hvat gjørdi tit við tey uppskotini ið andstøðan legði fyri Løgtingið, fyri at betra um korini hjá okkara pensiónistum ? jú tit feldu uppskotini, so góðir vóru tit við okkara pensiónistar, ikki eitt uppskot ið kundi betra um korini hjá pensiónistunum tóku tit undir við.

Men eftir at fleiri pensiónistar hava mint tykkum á, at Løgtingsval stendur fyri framman, hevur samgongan gjørt av at leggja uppskot fyri Løgtingið í gevur 400,00 kr. afturat um mánaðan. Sjálvur formaðurin fyri Landsfelag pensiónistana segði í fjølmiðlunum at teir høvdu vanta ein betri bata.

Men nú er panikkur komin í samgongulimir, nú valg stendur fyri durum, og tit fara at fáa fólksins dóm yvir førda politik, verður eitt uppskot gjørt í skundi fyri at lappa uppá verandi pensión.

Tá tú skrivar, at samgongan sær hvussu vánalig støðan er hjá m.a. limum hjá undirritaða og tí roynir samgongan saman við restini av føroyska arbeðismarknaðinum at finna eina breiða politiska semju um arbeiðsmarknaðarpensiónina. So fari eg, at spyrja teg Páll - hvørjir partar av arbeiðsmarknaðinum arbeiða við hesu semju ? tí í Føroya Arbeiðarafelag og øðrum fakfeløgum vita tey onki um hesar royndir at fáa breiða semju um arbeiðsmarknaðarpensión.

Men vit í FA hava leingi bíða eftir einari lógarbroyting í Tryggingarlógini so vit kunna seta okkara eftirlønargrunn á stovn í FA. Men eitt skalt tú vita, verkafólkið hevur ikki 8-10% av lønini at seta í eftirlønargrunn, og vit koma heldur ikki at góðtaka eina slíka lóg.

Partamaður tín, Finnur Helmsdal, skal eiga tøkk fyri at hann var so frægur, at hann saman við andstøðu politikkara legði uppskot fyri Løgtingið sum áleggur landsstýrismanninum í Vinnumálum, at koma við broytingar uppskoti til Tryggingarlógina so fakfeløgini kunna seta solidariska eftirlønargrunn á stovn, hetta uppskot varð samtykt nokk við tínari atkvøðu eisini, so nú er - um vilji er til staðar - at fylgja hesum málið upp so landsstýrismaðurin í Vinnumálum ikki sleppur at sýlta málið, til ov seint er at leggja uppskoti fyri Løgtingið til broyting av Tryggingarlógini. Tí vit í FA og onnur bíða eftir hesum, tí vit eru klár at seta okkara eftirlønargrunn á stovn.

**Skattalætti**

Her kann eg bert stutt viðmerkja, at um tú hevur fylgt við í kanningini sum FA hevur lati gjørt um livikostnað og skattaviðurskifti hjá teimum lágløntu og miðal inntøkum, ið varð løgd fram á aðalfundi FA´s í 2001, og sum var dagførd í november sama ár, vísir at tað er ikki lættari hjá teimum tímaløntu at klára seg, heldur tvørturímóti, so har er ongin bati at rósa sær av.

**Hvønn umboðar Ingeborg ?**

Tær nýtist ikki at fara í bløðini at spyrja hvønn eg umboði. Tí ongin ivi hevur verið um, øll tey mongu árini eg havi verið í FA, hvønn eg havi arbeitt fyri. Eg kann eisini siga tær, at eg fari ikki at spyrja teg um hvønn flokk eg fari at stuðla. Tí mær vitandi hava vit enn politisk frælsi her á landi, so ein og hvør kann stuðla tann politiska flokkin tey vilja, enn hava vit eisini bæði skrivi og talu frælsi, men hvar frælsi blívur av um ávísir persónar fáa vald, ja tað kann verða ein góður spurningur.

Eg kann eisini siga tær, at hjá leiðsluni í FA og øllum limafeløgum okkara hava allir politiskir litir rúmd. Og vit arbeiða ikki partapolitiskt, men fakpolitiskt og taka ikki eftir politiskum liti ella partapolitikki, men arbeiða m.a. eftir hvat politisku flokkarnir avrika í teirra arbeiði, og loyva okkum at tala at, tá vit meta at hetta arbeiði ikki er til frama fyri løntakaran.

Hvat í undirritaða og FA fara at arbeiða við í ár og komandi á ger aðalfundur felagsins av, tí vit hava demokrati í meginfelagnum so limafeløg okkara gera av hvørja leið felag okkara gongur.

# Føroyingar og heilsutrupulleikar v.m.!

**Hans Birgir Hansen**

Eg havi áður alment mótmælt arvagransking í Føroyum. Arvagransking og granskingarstovnar eru fullkomuliga óneyðug, tá tað finnast alternativir viðgerðarhættir her á landi. Eg kann vísa á búskapar- og samfelagsligan týdning við at broyta lívs-, kost- og nýtsluvanar hjá øllum bólkum av føroyingum, ið hava heilsutrupulleikar v.m. Tað finst náttúruheilivágur á danska og føroyska heimamarknaðinum, ið kann lekja føroyingar fyri allar deyðiligar sjúkur/fylgisjúkur. Náttúruheilivágur, ið ein kann fáa fatur á. Tað er við hjálp av náttúruheilivági og náttúruúrdráttum, at ein vann sær heilsu og økta vælveru aftur, og nú skal ein útbyggja sær góða heilsu. Tað er ein hópur av føroyingum, sum vóru uppgivnir av læknum, ið hava vunnið sær heilsuna aftur við hjálp av áðurnevnda. Hví ikki fáa roynt slíkt í dag? Eg havi áhuga í at taka hendan táttin upp aftur í bløðunum, og vil eg heita á allar lesarar um at geva sær neyðuga tíð at lesa heilsu/læknateigar. Tað hevur avgerandi týdning at kunna seg um, umveg til sjúku og lívið, ið ein kann vísa tykkum á úti á upplýsandi heimasíðu á internetinum.

Tað skal vera alment funnist harðliga at øllum, ið leggja fót fyri, at føroyingar vinna sær heilsuna aftur, hvat allir lækna-autoritetir gera í dag!

Tað er stórur munur á heilivágsfyritøkum og teimum við náttúruheilivági og -úrdráttum, ið eru úti á tí føroyska heimamarknaðinum. Tað hevði verið gott, um lesarar, ið kenna fólk við heilsutrupulleikum v.m. gjørdu vart við meg.

PS: Vitja heimasíðuna www.faroeinn.fo